

AVENSIS 2,0 SOL LEÐUR — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** JP 405 **Km:** 15.000
**Árgangur:** 17.08.2006

kr. 255.000,-



TOYOTA AVENSIS 2.0 SOL AUT. — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** DJ 672 **Km:** 24.000
**Árgangur:** 22.07.2005

kr. 225.000,-



TOYOTA RAV 4 2,0 VVT-I PLUS — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** LF 118 **Km:** 12.000
**Árgangur:** 16.02.2007

kr. 298.000,-



TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL B — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** BN 546 **Km:** 42.232
**Árgangur:** 09.03.2006

kr. 228.000,-



TOYOTA RAV 4 2,2 D-4D PLUS — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SN 519 **Km:** 29.920
**Árgangur:** 02.02.2007

kr. 328.000,-



HILUX 4X4 TD EXTRA CAB SR — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** PM 585 **Km:** 150.334
**Árgangur:** 16.10.2003

kr. 155.000,-



TOYOTA RAV 4 2,0 D-4D 4X4 — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UH 430 **Km:** 65.000
**Árgangur:** 07.04.2004

kr. 248.000,-



TOYOTA AVENSIS 2.0 D-4D SOL — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** FR 822 **Km:** 58.471
**Árgangur:** 10.07.2007

kr. 275.000,-



TOYOTA COROLLA 1,4 LUNA D-4D — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SF 673 **Km:** 88.209
**Árgangur:** 19.05.2005

kr. 165.000,-



MITSUBISHI PAJERO SPORT VAN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** MG 794 **Km:** 35.000
**Árgangur:** 17.02.2006

kr. 195.000,-

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, i eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Kvinnuskulpturar í Smiðjuni

**Ein røð av hugtakandi kvinnuskulpturum sermerkja framsýningina hjá fýra listakvinnum í Smiðjuni í Lítluvík í løtuni**

LIST
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*



*Hugtakandi kvinnuskulpturin við lokkandi afturpartinum sæst best við at fara inn í Smiðjuna í Lítluvík*

Smiðjan í Lítluvík er í hesum døgum karmur um eina sera fjølbroytta listaframsýning, har tað serliga er ein røð av kvinnuskulpturum, ið stjala uppmerksemi.

## Lívsmyndir

Liggjandi, dansandi, sitandi, hangandi ella hyggjandi út gjøgnum sprossavindeyguni ...

Kvinnuskulpturar í øllum sniðum og støðum seta sín sermerkta dám á framsýning hjá teimum fýra listakvinnunum Mary Strøm, Elsu Zachariassen, Susanne Hansen og Birgit Kirke í Smiðjuni í Lítluvík hesar dagarnar.

Skulpturarnir eru gjørdir úr endurnýtslutilfari og eru sonevndar lívsmyndir, sambært listakvinnunum.

Harumframt hava tær fýra listakvinnurnar eisini eina røð av abstraktum og naturalistiskum málningum við á framsýningini, har arbeitt er við formi og strukturi í akryl.

Hetta er fyrstu ferð tær fýra listakvinnurnar, sum allar búgva í Danmark, hava felags framsýning í Føroyum.

- Tað følist næstan sum at vera til próvtøku, tí vit kenna jú tey flestu, sum koma at vitja framsýningina. Hinvegin er tað óføra stuttligt at hitta fólk, tú kennir, aftur og hoyra teirra hugsan um framsýningina, sigur Mary Strøm.

Tær fýra listakvinnurnar hava leingi arbeitt saman og hittast javnan at leita sær íblástur frá hvørji aðrari.

Framsýningin í Smiðjuni er opin frá klokkan 12 til 18 fram til 22. juli.


Cand.office

City Tórshavn søkir eftir skrivstovufólki at byrja sum skjótast.

**Starvið**
Starvið fevnir um telefonavgreiðslu, ordramóttøku, bíleggingar, umsiting av vøruskrá og nethandli umframt annað fyrifallandi arbeiði í hesum sambandi.

Talan er um avloysarastarv, í fyrsta umfari til 1. august 2009. Arbeiðsvikan er 40 tímar, og lønin verður sambært avtalu.

**Yrkisførleikar**
Vit vænta, at tú hevur royndir og helst útbúgving í skrivstovu- og/ella handilsyrkinum. Hollur telduførleiki er ein fyritreyt.

**Eginførleikar**
Tú ert fyrikomandi og skyldurøkin, sýnir tænastusinni, áræði og ábyrgd, og tú arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og saman við øðrum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu vera okkum í hendi innan fríggjadagin 25. juli og kunnu stílast til Nema, HR-deildin, Postmoga 109, 110 Tórshavn ella við teldubrævi til hrdeildin@nema.fo.

**Meira at vita**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Tonny Brimsvík á tlf. 794 314 ella á tbr@city.fo.

*City er partur av Nema-samtakinum og er skrivstovumarknaður við einum breiðum úrvali av teldu- og skrivstovuútbúnaði til bæði arbeiðsplássið, skúlanæmingin og húskið.*

*City hevur deildir í Tórshavn, Klaksvík og Saltangará, umframt at vit bjóða eina útkoyringartænastu, sum tryggjar, at kundin hevur vøruna í seinasta lagi dagin eftir bílegging.*

NEMA

city
www.city.fo

SENDISTOVAN